## HEILSANIR



**Góði Aron**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 22. sept.
**Ynskja Bjørg, Laura, Poula og Lovisa**



Vit vilja hjartaliga takka øllum, sum gleddu okkum við gávum, blómum og fjarritum á hjúnabandsdegi okkara 19. juli 2003 og gjørdu okkum dagin ógloymandi.
**Kærar heilsanir**
**Hariann, Jóhann og Hákun Stenberg**



**Góða Rakul**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini ynskja vit tær.
**Mamma, pabba og Randi**



**Góða fitta Auður**
Hjartaliga tillukku á 13 ára degnum. Tú er tann fittasta stórasysturin í verðini.
**Ynskja Páll og Sigrun**



**Hey hey Auður**
Tillukku við degnum tann 15. sept. Fá nú ikki heilt fýrakantað eygu.
**Heilsan ja, gita hvør**



Eg við familju vil takka øllum, ið gleddu meg á mínum fermingardegi tann 6. apr. 2003.
**Blíðar heilsanir Sissal Randarsól Næs**



**Góða fitta omma**
Hjartaliga tillukku við tí runda føðingardegnum í morgin. Vit elska teg.
**Ynskja Barbara, Arni og Oddfríður**



**Góða Auður**
Hjartaliga tillukku á 13 ára føðingardegnum. Vit ynskja tær alt tað besta í framtíðini.
**Mamma og pabba**



**Góða Auður**
Ja, nú er tú blivin stór. Tillukku, tillukku. Vit gleða okkum til at koma í føðingardag hjá tær.
**Gita hvør**



**Góði Bárður**
Tillikku við 13 ára føðingardegnum.
**Ynskir Annika**



**Góða Annika**
Tillukku við 3 ára føðingardegnum.
**Ynskir Bárður**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 19. sept. Vit eru góðar við teg.
**Heilsan diddurnar Ása, Silvia og Lilja**



**Góða Eivør Súsanna**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 21. sept. ynskja vit tær.
**Omma, abbi, Aja og Emmamostir**
**PS.** Kemur tú skjótt í vikuskifti?



**Halló Dill Dill**
Hjartaliga tillukku við tínum runda degi 20 sept.
**Heilsan myndatakarin**
**PS.** Vónandi fái eg pizza



**Góði Torkil**
Hjartaliga tillukku á 3 ára føðingardegnum.
**Ynskja omma og abbi**


**30,- kr. Sosialurin**

### Heilsanir

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




Rói Egholm, nýggjur tinglimur Tjóðveldisfloksins:

# Loysingin og vinnulívið størstan áhuga

*- Eg gangi fult innfyri, at Føroya Banki, framleiðsluvirkir og flogfelag o.s. fr koma á privatar hendur. Vinnulívið má úr politikki, tí politikkarar skulu ikki reka vinnulív, men politikk, meðan vinnulívið skal sjálvt reka vinnulív, sigur Rói Egholm*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Nýggi tinglimurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Rói Egholm vil hava Føroya Banka og Atlantic Airways av almennum hondum, tí politikkarar skulu ikki reka vinnulív, men halda seg til politikkin. Hann heldur eisini tað er stak óheppið, at kjakið um loysing er vent til at verða eitt kjak um, hvat danir vilja lova okkum, og ikki hvat føroyingar sjálvir ynskja.**


NÝGGJUR TINGLIMUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*


Seinnapartin mikudagin varð Annita á Fríðriksmørk endaliga sett sum landsstýrismaður í Mentamálum. Tingsessin eftir hana fer havnarmaðurin, Rói Egholm, at røkja restina av valskeiðnum. Rói er sjálvur triðji eigari av fiskasølufyritøkuni Farex í Havn, og hevur drúgvar royndir sum vinnulívsmaður. Mikudagin var fyrsti tingfundur hjá nýggja tingmanninum úr Tjóðveldisflokkinum, og hann letur væl at.

– Allir landsstýrismenn og løgtingslimir bjóðaðu mær vælkomnum, og royndu at seta meg inn í mannagongdirnar í tingarbeiðinum. Øll vóru sera fryntlig og fyrikomandi, og alt í alt var tað ein sera væleydnaður dagur, greiðir Rói Egholm frá.

Spurdur, um hann hevði nakrar hugsanir um tingarbeiðið, áðrenn hann steig inn um tinggátt, svarar Rói, at helst verður minni ferð á tingarbeiðinum í mun til dagliga starvið sum fiskasølumaður.

– Samanbert tú fiskasølu við at koyra Formula 1, so havi eg ein idé um, at tingarbeiðið er sum at koyra buss, og so er spurningurin um mínar royndir at koyra Formula 1 kunnu læra meg at koyra buss, greiðir Rói Egholm frá.

## Almenna burtur úr vinnulívinum

Síðan 1986 hevur Rói Egholm arbeitt sum fiskasølumaður, og hann dylir ikki fyri, at hann er ein vinnulívsmaður um ein háls. Tá vit spyrja Róa, um hann ikki heldur átti at verið limur í Fólkaflokkinum, sum vanliga ber orð fyri at verja áhugamálini hjá júst vinnulívsfólki, er Rói skjótur at svara, at hann hevur altíð verið tjóðveldismaður

– Sum eg síggi tað, so er eingin veruligur vinnulívsflokkur í Føroyum, sum kann kalla seg frílyntan. Tað eru ikki flokkarnir, sum skulu lastast fyri, at tað almenna eigur meginpartin av framleiðsluapparatinum, men ei heldur er tað nakar flokkur, ið veruliga arbeiðir fyri at fáa framleiðsluapparatið av almennum hondum aftur. Av tí at eingin arbeiðir fyri tí málinum, haldi eg ikki, at nakar flokkur veruliga kann kalla seg frílyntan, sigur Rói Egholm.

Nýggi tinglimurin úr Havn leggur ikki fingrarnar ímillum, tá prátið fellur inn á spurningin um støðuna hjá tí almenna í føroyska vinnulívinum. –Eg gangi fult innfyri, at Føroya Banki, framleiðsluvirkir og flogfelag o.s. fr koma á privatar hendur. Vinnulívið má úr politikki, tí politikkarar skulu ikki reka vinnulív, men politikk, meðan vinnulívið skal sjálvt reka vinnulív, sigur Rói Egholm.

Spurdur ítøkilig um, hvussu ein slík tilgongd skuldi skipast, svarar Rói, at vit áttu at tikið samband við fólk, ið dagliga taka sær av sølu av fyritøkum aðrastaðni í heiminum, og hóskandi spurt tey, hvussu ein slík tilgongd átti at verið skipað.

Rói Egholm vil ikki hoyra nakað um stuðul í føroyska vinnulívinum. – Vit eiga at hava ein so einfalda skipan sum gjørligt, tí í løtuni hava vit eitt virrivarr av stuðningum og avgjøldum, sum er ein hurlivasi og ógvuliga ósunt. Vit eru komin til ta støðu í fiskivinnuni, at tey virkir sum eiga at doyggja doyggja eisini, og tað hevur ikki verið ósunt fyri vinnuna, og ta skipanina áttu vit at yvirført á aðrar skipanir, heldur nýklakti tingmaðurin.

## Loysingin framaftur í ljósmála

Umframt stóran áhuga í vinnulívi, so liggur fullveldisspurningurin eisini Róa Egholm nær.

– Tá eg flutti heim í 1995 úr Spania, merkti eg týðuliga, at ein sterk tjóðskaparkensla var í umbúna. Hetta var fyrstu ferð, føroyingar sjálvir høvdu boð uppá eina loysingartilgongd, sum bygdu á føroysk motiv, og tað var ótrúliga áhugavert at koma heim til. Í dag er støðan tíverri hon, at nú er aftur vent í holuni, og vit nýta aftur donsk motiv og blokkstuðulin fyri at taka støðu, og tað hevði verið ynskiligt, um vit vendu aftur til, hvat vit føroyingar ynskja og ikki hvat danir ætla, fortelur nýggi tinglimur Tjóðveldisfloksins.

Hann sigur seg ætla at arbeiða fyri at fáa kjakið um loysing framaftur í ljósmála, har tað aftur verða føroyingar, ið seta dagsskránna. Rói vísir á, at tað er ómetaliga týdningarmikið at nýggjur íblástur kemur í kjaki aftur. Hann heldur, at í løtuni snýr loysingarkjakið seg um ábreiðslur ímóti dønum, og tað er ikki rætt, tí so koma vit aldrin fram til hvat føroyingar veruliga ynskja á økinum, heldur Rói Egholm

## Dámar væl náttúruna

Tá Rói Egholm ikki er vinnulívsmaður, dámar hann ómetaliga væl at ferðast úti í føroysku náttúruni. – Eg og vinfólk plaga at vera í fjøllunum, og eisini dámar mær stak væl at verða í fjørðinum og eftir fugli, tí frítíðin skal nýtast til nakað heilt annað enn vinnulív, sigur hann

Rói Egholm var nógv tengdur at ítrótti í ungdómsárunum, og tað fylgir honum framvegis. Hann sigur frá, at hann hevur framvegis nógv vinfólk gjøgnum ítróttina. Í løtuni er størsti áhugin í fótbólti, har flestu vinfólkini eisini hava stóran áhuga, meðan tá hondbólturin fer á rull aftur, so fer hann eisini at fylgja við har.



*Rói Egholm letur væl at fyrsta degnum í tinginum. - Allir landsstýrismenn og løgtingslimir bjóðaðu mær vælkomnum, og royndu at seta meg inn í mannagongdirnar í tingarbeiðinum. Øll vóru sera fryntlig og fyrikomandi, og alt í alt var tað ein sera væleydnaður dagur, greiðir hann frá.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Fakta

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Rói Egholm |
| **Aldur:** | 43 ár |
| **Giftur:** | Maibritt Svabo Egholm, eiga børnini Rakul og Bjørk |
| **Útbúgving:** | Bilmekanikkari, Akademi økonom í altjóða marknaðarføring og strategi |
| **Starv:** | Farex |